SOSIALURIN

Blaðstjórn:
Vilhelm Johannesen,
Fyribils ábyrgdarstjóri,
tlf. 5 5873, Klaksvík

Prentstaður:
Prentsmiðjan á Heygsbreyt
tlf. 1 1820
Tórshavn

Tað er ikki loyvt at avfotografera lýsingar og myndir úr SOSIALINUM til nýtslu í øðrum bløðum uttan loyvi frá ábyrgdarblaðstj.

Liberalisma

HETTA lítla orðið — liberalisma — er yndisorð hjá teimum borgarligu flokkunum og verður av teimum ofta nýtt at seta upp ímóti sosialismuni og serstakliga móti sosialistiskum fíggjar- og handilspolitikki.

TÓ at hetta orðið ljóðar væl og tað ivaleyst kann leggjast nógv gott í tað av monnum, ið duga at málbera seg so snildisliga, hava tunguna á røttum stað, tá ið týdningur skal leggjast í tað — eisini hin mest villeiðandi.

ALT tað »frælsið« ið kann leiðast kann av hesum, kann ljóða væl; men tað skal valla henda, at »liberalistar« samstundis greiða frá tí ovurstóra vanda, ið fjalir seg aftanfyri hesa ofta beinleiðis óhugnaligu liberalismu.

HESIN »frælsis«-politikkur var kanska ikki heilt av leið, um allir borgarar samfelagsins høvdu somu startmøguleikar og stóðu á jøvnum føti; men so er ikki — og tá høvdu vit jú eisini hitt sosialistiska samfelagið, sum er óforeiniligt við liberalismuna.

LIBERALISMAN í tí líki allir borgarligu flokkar lovprísa er onki minni enn eitt eitrandi svørð ímóti teirri stóru fjøldini av fólkinum; hon er leiðin til ójavnað og á ófrælsi fyri tey mongu; hon er leiðin til arbeiðsloysisins forbannilsi; hon er leiðin til prísokur og lønartrýst; hon er leiðin til miskunnarleyst monopolstýri, peningavaldsins morðgírigu skaltan og valtan eftir egnum tykki, kúgan og trælkan.

LIBERALISMAN er ikki politikkur fjøldarinnar — fiskimansins, arbeiðarans og løntakarans — als ikki; men tænir og er teimum til vildar, ið sita væl í »ovara enda« samfelagsins, haðani tað er lætt umvegis politiskar meiningsfelagar og aðrar medarbeiðarar at snara samfelagshjólið soleiðis, at tað verður einstaklinginum ella tí einstaka best at gagni.

KRING heiminum berjast fólk fyri størri frælsi og betri lívikorum. Hitt harðrenda valdsmannalyndið, stingur seg mangarstaðir fram og berjir niður allar spírar til frælsi og menniskjaligar tragediur verða ótaldar. Tað er ofta peningavaldið og harðræðisvaldið sum standa aftanfyri hesar misgerðir móti mannaættini.

HIN einasta politiska leiðin, sum hevur prógvað til fulnar, at hon vil verða tænari hjá menniskjanum, fólkaræðinum og betran av korum allra, er tann leið, sum sosialdemokratarnir hava lagt til brots fyri.

VIÐ miðvísari útbygging av landsins møguleikum, har ongin verður gloymdur, har øll hava sín møguleika, verða bestu og størstu virðir skapt — og hetta er leiðin, sum javnaðarhugsjónin ber í skjøldri sínum.

Skrivstovufólk

Búgvið fólk kønt við alt vanligt skivstovuarbeiði, serliga við journaliseringar- og skjalasavnsarbeiði, fær starv á landsskrivstovuni.

Løn eftir sáttmála við starvsmannafelagið.

Skrivlig umsókn verður at senda landsskrivstovuni, Tinganes, innan 1. august 1972

SKRIVSTOVUSTJÓRIN

FÆRØSK MARGARINE

Vita No 1

VITAMINISERET

FÆRØSKT PRODUKT FINT PRODUKT

Dagbókin

Gudstænastur. Kjartan Mørkøre prestur prædikar í Kaldbaks kirkju í morgin.

Brúdleyp. Í dag giftast í Christianskirkjuni skrivstovukvinna Hanna Simonsen og lærari Bjarni Jacobsen, Klaksvík.

Hans K. Hansen — faðir Haldor Hansen, løgtingsmann — er deyður. Hann var jarðaður seinasta hósdag.

Av misgáum var ein villa komin í listan um føðingardagar í seinasta blað. Skrivað varð, at Malla Samuelsen, fylti 65 ár týsdagin, men er hetta skeivt, og verður tí avsannað.

Franska kórið Les Rossignolets — Náttargalarnir — sum komu til Føroya hósdagin hevði konsert í Havn í gjárkvøldið. Í kvøld skal kórið hava konsert í Tvøroyrar kirkju.

Prógv. Anne Kari Skarðhamar hevur við universitetið í Oslo tikið prógv sum cand. phil. í norskum og norðurlendskum máli og føroyskum bókmentum sum serevni.

Tummas T er farin at sigla heim undan New Foundlandi.

FØROYA BANKI

banki FØROYA

Bekendtgørelse

På finansloven for finansåret 1972/73 er bevilget et beløb på 1.700,- kr. til understøttelse af færinger til uddannelse på et seminarium i det øvrige kongerige.

De, der ønsker at komme i betragtning ved bevillingens fordeling, må inden den 1. september 1972 indsende ansøgning til skoledirektionen indeholdende følgende oplysninger:

1. Hvilket seminarium agter ansøgeren at søge optagelse på.
2. Ansøgerens tidligere uddannelse m.m. bilagt anbefalinger.
3. Attest fra forstanderskabet om, at ansøgeren må anses for ubemidlet.
4. Erklæring om, at ansøgeren efter end seminarieuddannelse agter at søge ansættelse som lærer på Færøerne.
5. Såfremt ansøgeren allerede er optaget på et seminarium, attest fra dettes rektor.

Det bemærkes, at der ikke anvendes særlige ansøgningsblanketter.

FÆRØERNES SKOLEDIREKTION,

Tórshavn, den 11. juli 1972.

P. d. v.

Leif Groth

STØRV

Nú eru líkindi til at vera við frá byrjanini.

Tann 1. november í ár væntast stovnuirn undir sosialudeild býráðsins, vøggustova (40 børn), barnagarðar (60) børn) at opna, og verður tí søkt eftir:

LEIÐARUM
ASSISTENTUM og
PRAKTIKANTUM

Hava tygum áhuga at søkja so send umsókn til Tórshavnar býráð, sosialudeild, W. U. Hammershaimbsgøtu, 3800 Tórshavn, tlf. 12400 saman við prógvum og møguligum viðmælum í seinasta lagi 30. september 1972.

Lítla Sandy, ið er fimm ára gomul, hevði ein dagin fingið so góðan hug at spæla við vaskimaskinuna, sum stóð í kjallaranum, at hon helt tað vera vert at royna ein slíka. Sandy grulvaði inn í maskinuna, og har sat hon føst. Fólk í grannalagnum hoyrdu stutt eftir sjóheitan grát, men eftir hálvum tíma var Sandy leys úr vaskimaskinuni.

LASSE SØRENSEN: »TEGNINGER FRA DEN FÆRØSKE NATUR«

LASSE's fugle og naturtegninger m. originaltekst (bl. a. kendt fra Dimmalætting) er nu kommet i bogform. Denne smukke indbundne bog bør stå i ethvert færøsk hjem. DEN IDEELLE GAVEBOG.

Klip her — — — — — — — — — — — — — — — — — — — Klip her

TRYKSAG

KLIP UD OG SEND dette kort (uden frimærke), så sender vi omgående Lasse's »TEGNINGER FRA DEN FÆRØSKE NATUR« (indbundet) pr. efterkr.

Undertegnede ønsker ☐ stk. »TEGNINGER FRA DEN FÆRØSKE NATUR« tilsendt pr. efterkrav. Pris kr. 42 + porto.

Navn: ……………………………………………

Adresse: ……………………………………………

Postbesørges ufrankeret (Modtageren betaler potoen)

60

Forlaget Tusøla
3812 SØRVÁG

Reserveret postvæsenet